# Hyggjarin skal gjalda



*Títt val av antennu veldst millum annað um, hvussu langt tú ert frá sendaranum hjá Televarpinum*

**Fleiri brúkarar hava ringt til Sosialin, og biðið okkum skrivað um trupulleikar við televarpinum. Tað vísir seg, at hóast hyggjarin í byrjanini fekk at vita, at vanliga UHF-antennan var nóg góð til Televarpið, skal kundin sjálvur gjalda fyri møguligar umvælingar ella nýggja antennu**

TELEVARPIÐ
*Rógvi Borðoy*

Fryst. Einki signal. Onkrar kanalir burtur. Enntá allar kanlirnar burtur. Hetta eru nakrir av trupulleikunum, fólk kann hava havt av Televarpinum seinastu tíðina. Summi hava enntá sagt, at móttakarin hevur fryst upp til 40 ferðir um dagin, og hann verður av tí sama nevndur "frystiboksin".

Tað er rætt, at summi hava trupulleikar av Televarpinum, men orsøkin stendur kanska beint oman á sjónvarpinum. Stjórin í Televarpinum sigur nevniliga, at antennan í húsarhaldinum kann hava nógv at siga. Og hóast kundarnir í byrjanini fingu at vita, at vanliga UHF-antennan kundi brúkast til Televarpið, vísir tað seg nú, at tað ikki altíð er so.

## Byrjunartrupulleikar

Laila Hentze, stjóri í Televarpinum sigur, at tey gera alt, hvat tey kunna fyri at hjálpa brúkaranum. Hon viðgongur, at tey hava byrjunartrupulleikar.

- Hetta er nýggj tøkni. Antennan kann bæði vera ov sterk og ov veik. Um antennan er í lagi, so er signalið eisini í lagi, sigur hon.

Hinvegin kann tað vera torført sum brúkari at vita, hvussu tú skalt bera teg at við at finna røttu antennuna. Tí er antennan ov veik ella ov sterk? Hvussu nógvar antennur skalt tú keypa, áðrenn tú keypir ta røttu?

Tað veldst um, hvar tú býrt, sigur Laila Hentze. Eitt slag av antennu kann væl virka einastaðni, men ikki aðrastaðni.

## Hjálpin er nær...

Ring til Televarpið og spyr. Tað kann gera munin, sigur Laila Hentze, tí ofta kunnu tey gjøgnum telefonina hjálpa kundanum á veg. Tey kunnu finna fram til, um antennusignalið er ov veikt og vegleiða um, hvørja antennu tú eigur at keypa. Hetta er tó einasta ókeypis tænastan, tú fært hiðani.

Televarpið kann eisini ávísa ein teknikara, sum tú kanst heita á.

Teknikarin kann so siga, um antennan skal snarast ella hvat skal gerast. Hesa tænastu skalt tú tó gjalda fyri.

Tú kanst eisini fara í ein radiohandil og spyrja um ráð. Radiohandilin í Havn sigur til dømis, at teir eru raskir at siga tær, hvat slag tú skalt keypa. Hevur tú umaftur keypt skeiva antennu, kanst tú fyri tað mesta tosa við teir, og lata antennuna innaftur. Hevur tú í ringasta føri keypt eina ov sterka antennu, kanst tú keypa ein dempara at minka signalið við.

## ...men tú fært rokningina

Undir øllum umstøðum kanst tú ikki rokna við, at tað verður ókeypis. Antin skal ein nýggj antenna fyri einar 500 krónur á borðið, og møguliga ein dempari til hana. Ella skalt tú hava ein teknikara á vitjan, sum so kann venda antennuni rætt ella ráðgeva tær viðvíkjandi keypi av antennu.

## Brúkarasamtakið

Ingun Simonsen, formaður í Brúkarasamtakinum sigur, at hetta virkar sera órímiligt.

- Eg hevði væntað, at Televarpið tók kundar sínar meir álvarsliga, tí har er jú kapping á økinum. Kundarnir kunna bara fara til onkran annan, um tey ikki verða viðfarin á nøktandi hátt.

- Um Televarpið vil varðveita kundarnar, mugu tey gera eitt betri arbeiði enn hetta, sigur Ingun Simonsen.

Hon heldur fram, at hetta er enn eitt dømi um, hvussu nógv vit hava brúk fyri einari brúkaralóggávu. Hon sigur, at tað er sera umráðandi at fáa lógina, tí brúkarin stendur uttan rættindi.

Júst hetta dømið hevur hon ikki viðgjørt í Brúkarasamtakinum, og minnur á, at hon tosar fyri seg sjálva. Hon minnir annars brúkaran á, at tað er slík dømi, Brúkarasamtakið er til.



*"Frystiboksin", sum móttakarin hjá Televarpinum verður kallaður millum manna, sigst av kundunum geva ov vánaligt signal. Onkrar dagar kann signalið hjá hyggjarunum hvørva upp til 40 ferðir*



# Arbeiða alt døgnið

**G! Festivalurin nærkast í stórum fetum, og nú vantar bara tað seinasta í at fáa alt upp á beinini. Nú verður arbeitt alt døgnið fyri at megna at fáa alt klárt til teir báðar dagarnar festivalurin er**

G!
*Ingrid Bjarnastein*

**Syðrugøta:** Longu í morgin, hósdag, byrjar G! festivalurin so smátt við upphiting í Losjuni í Gøtu við nøkrum íslendskum bólkum.

Tann nógv umrøddi og leingi fyriskipaði G! festivalurin fer av bakkastokki og endar um vikuskiftið, og fyrireikararnir leggja nú eina seinastu hond á alt, sum skal verða klárt tá teir mongu bólkarnir koma til Syðrugøtu at spæla.

G! hevur leigað sær eini høli til skrivstovu til endamálið. Hølini eru nýtt til at arbeiða í nú uppundir festivalin, og er ætlanin, at tey eisini skulu nýtast til fjølmiðlafólkini undir sjálvum festivalinum. Teldur eru útvegaðar av Farodane, og skrivstovu útgerðin er lænt frá Føroya Banka.

## Útlendskir gestir

Nógvir gestir verða á festivalinum. Talan er um fleiri útlendskar gestatónleikarar sum koma henda vegin bara fyri at vera við á G!

– Tað koma yvir 50 útlendskir tónleikarar til Føroya til festivalin. Harafturat eru nógvur frá fólkatónleikarastevnuni, umframt fólk, sum ikki eru á skránni, greiða Jón Tyril og Sólarn Solmunde frá, sum báðir eru primus motor aftanfyri G! saman við nógvum góðum kreftum sum eitt nú Laufey Blaasvær, sum er samskipari av G!

– Ein afrikanari kemur at spæla uppá afrikanskar trummur og harafturat verður ein indari, sum kemur at dansa á glasi. Hann hevur eisini annað áhugavert við eldi og tílíkum við í framførsluni.

Høvuðsnavnið á festivalinum er uttan iva Bomfunk MC´s úr Finlandi. Teir spæla elektroniskan tónleik. Harumframt verða nógv onnur kend nøvn við bæði føroysk og útlendsk. Nevnast kunnu Glorybox, K-System, Eivör, Hanus G. Johansen, Enekk, Xploding Plastix og so framvegis.

## Hýsast lokalt

Fyrireikararnir hava lagt seg eftir at geva útlendskum gestunum eitt so egið upplivilsi sum møguligt.

– Nakrar gamlar konur í Gøtu eru fluttar út meðan festivalurin er fyri, at vit kunnu leigað húsini og hýsa okkara útlendsku tónleikarum. Vit hava valt at lata vera við at senda tónleikararnar á hotell, tí vit vænta, at teir fáa eitt nógv betri upplivilsi her í tí lokala nærumhvørvinum, greiða fyrireikararnir frá.

Umframt at tónleikararnir verða hýstir lokalt, so er eisini høvi fyri tjalding á G! Beint við síðuna av skúlanum við Gøtugjógv verður eitt tjaldingarøkið, og eitt verður eisini á Kambsdali.

Forsølan av atgongumerkjum fór í gongd fyri nakað av tíð síðani, men í fyrstuni varð striltið at fáa rættiliga gongd á. Nú er glið komið á søluna, og Kunningarstovan í Havn hevur longu havt útselt einaferð. Neyva talið av longu seldu atgongumerkjunum er tó ikki heilt greitt enn, men tað er avmarkað. Hetta kemst av, at um veðrið spælir eitt puss, so verða fyrireikararnir noyddir til at flyta festivalin innandura. Tá koma tiltøkini, sum skulu vera á sandinum at vera í ítróttarhøllini á Kambsdali, og tey, sum skulu vera á spæliplássinum verða flutt í Mentanarhúsið í Fuglafirði.

## Føroyskt video

Finski bólkurin K-System skal ikki bara spæla á festivalinum. Teir koma eisini at gera eitt videolag her uppi.

– Tað eru tey somu, sum hava gjørt videoløg fyri Bomfunk MC´s og Darude, sum koma at gera hetta videolagi.

Hetta vil siga, at tað eru góð útlit fyri, at hetta fer at vera víst á MTV og aðrastaðni, av tí at K-System er ein kendur bólkur uttanlands.

Fyrireikararnir leggja nú alla orku í at fáa alt klárt.

– Seinastu vikurnar hava vit verið eini 10 fólk, sum hava arbeitt fulla tíð og meira enn tað fyri at fáa alt klárt, siga Jón og Sólarn.

– Tað er týdningarmikið hjá okkum, at tiltakið ikki miseydnast, tí Grót tolir ikki ein so stóran peningaligan miss.

Nú eru so bara tveir dagar eftir til alt fer av bakkastokki. Einasta tiltak av sínum slag í Føroyum bíðar bara eftir at fara í gongd.

»Eg vóni bara, at veðrið verður gott« tykist at vera tann afturvendandi setningurin í Gøtu nú um dagarnar. So er bara eftir at vita, um veðurgudarnir vísa vælvild ella heldur hava hug at spæla sær eitt sindur við regn og vind um vikuskiftið.



*G! festivalurin fer av bakkastokki um tveir dagar. Hetta er Føroya einasta og størsta tiltak av sínum slag*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Kirkjukonsertir við Daisy og Jóannes

TÍÐINDASKRIV
*frá Konsertfelagnum*

Í vikuni áðrenn ólavsøku verða fýra kirkjukonsertir hildnar ymsastaðni í landinum. Tað eru Daisy Johannesen, sopranur, og Jóannes Nolsøe, organistur, ið bera fram tónleikin

Daisy Johannesen er ættað úr Klaksvík. Hon starvast sum fysioterapeutur í Keypmannahavn. Í frítíðini fæst Daisy Johannesen nógv við sang. Hon er beint nú afturkomin av altjóða kórkappingarferð í Tjekkia saman við »Kammerkoret Hymnia«, sum vann tað, ið vinnast kundi! Klaksvíkskvinnan, sum í 90'unum lærdi at syngja í Reykjavík, er eisini kirkjusangari í eini kirkju í Keypmannahavn.

Jóannes Nolsøe er vágbingur og starvast sum organistur í Hulsig og Skagen í Norðurjútlandi.

Konsertferðin komandi er samantvinnað av orgulsolo, a cappella solosangi og sangi við orgulfylgispæli. Í sambandi við at tað í ár eru 300 ár liðin, síðan gitna sálmaskaldið Thomas Kingo doyði, er ein partur av skránni vígdur Kingo. Daisy Johannesen syngur a cappella tvey gomul føroysk kingoløg og Jóannes Nolsøe spælir tríggjar orgulkoralir lagdar til rættis av Antoni Heillller (1923-79). Hesi umleið 3-400 ára gomlu løg – tað eina er vísulagið til sálmin »Harmur og gleði í felag tey reika« – hevur Heiller ílatið nýggjan harmoniskan búnað og soleiðis sameinað gamalt og nýtt. – Annað føroyskt á skránni eru tvey løg hjá Paula í Sandagerði til tekstirnar »Flýgur tú lógv« og »Nú aftnar dagur« hjá feðgunum Regini og Jákupi Dahl, prósti.

Konsertirnar byrja við Toccatu í F-dur (BuWV 156) hjá Buxtehude. Dómorganisturin Oddvør Johansen hevur onkuntíð spælt Toccatuna úr Suiet Gothique hjá franska tónaskaldinum Böellmann (1862-97). Jóannes Nolsøe endar kirkjukonsertirnar við at spæla eitt annað stykki hjá hesum sama Böellmann – nevniliga »Final-Mazzre« úr suitu nr. 2 og 27.

Kirkjukonsertirnar verða á hesum støðum: 21. juli kl. 20.00 í Fuglafjarðar kirkju, 23. juli kl. 21.00 í Havnar kirkju, 24. juli kl. 19.00 í Christianskirkjuni og 27. juli kl. 16.00 í Glyvra kirkju.

# Temadagur um ridluskriða og sníkar hjá seyði

LANDBÚNAÐUR
Tíðindaskriv

Í samband við at Bóndafelagið fær vitjan av tveimum djóralæknum verður skipað fyri tiltaki í Búnaðardeplinum leygardagin 19. juli.

Tað eru teir báir Sigurdur Sigurdarson, djóralækni úr Íslandi og Karl Erik Hammarberg úr Svøríki, sum vilja siga frá um heilsuviðurskfitir hjá seyði í grannalondum okkara. Sigurdur Sigurdarson hevur drúgvar royndir innan kanningar og niðurberjing av ridluskriða í Íslandi, og Karl Erik Hammarberg úr Svøríki hevur fingist serstakliga nógv við sníkar hjá seyði.

Væntandi koma umboð fyri landsdjóralæknan og virkandi djóralæknar her í Føroyum at siga frá um okkara egnu viðurskiftir á økjunum. Hagtøl um nýtslu av fyribyrgjandi heilivági í Føroyum verða løgd fram á fundinum.

Bóndafelagið skipar í hesum sambandi fyri einum sokallaðum temadegi í Búnaðardeplinum leygardagin 19. juli. Tiltakið byrjar kl. 10 og heldur á út á dagin. Dagurin byrjar við fyrilestrum og seinni verður møguleiki at bera fram spurningar og skifta orð við fyrilestrarhaldararnar. Øll við áhuga fyri temanum eru vælkomin.